# Góð upptakt til steypafinaluna

**Liðskiparin hjá HB, Rúni Nolsøe, væntar ikki, at HB kann venda 0-5 tapið á útivølli, tá ið føroyameistararnir í kvøld leika Champions League undandyst ímóti georgiska FC Wit, men sær dystin heldur sum eina góða upptakt til steypafinaluna um góða viku**

CHAMPIONS LEAGUE
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Rúni Nolsøe, liðskipari hjá HB, sigur, at Champions League dysturin hjá HB í kvøld á Tórsvølli ímóti georgiska FC Wit er góð upptakt til steypafinaluna um góða viku*

Tað er ein nærum ómøgulig uppgáva hjá einum føroyskum liði at venda einum 0-5 tapi á útivølli, og ikki óvæntað hava leikararnir hjá HB heldur ikki tær stóru vónirnar um koma víðari í Champions League, nú teir í kvøld fara á Tórsvøll at taka dystin upp við georgiska FC Wit við omanfyri nevndu útgangsstøðu.

## Tordu ov illa í Georgia

Hópurin hjá HB til dystin í kvøld er tann sami, sum hann var í Georgia. Veteranurin Jan Dam er farin at venja í barndómsfelagnum aftur, eftir at hava verið í Danmark í eina tíð, men liðskiparin hjá HB, Rúni Nolsøe, helt týsdagin, at Jan neyvan hevði loyvi til at spæla við í dystinum í kvøld. Landsliðsleikarin Rógvi Jacobsen var ikki við í Georgia, og hann verður heldur ikki við í kvøld, tí at hann er framvegis leikbannaður.

Rúni Nolsøe sigur, at dysturin í kvøld heldur er ein gott høvi til at fáa dystarvenjing á grasi undan steypafinaluni um eina góða viku, heldur enn ein møguleiki hjá HB at spæla seg víðari í Europa. Hesar seinastu vikurnar hevur HB einans vant á grasi til tess at verða best møguligt fyrireikaðir til bæði Champions League og steypafinaluna.

At tað ikki gekk eftir vild á útivølli í Georgia, sigur Rúni Nolsøe hava sína orsøk. - Vit tordu alt ov illa og vóru ov bangnir. Kanska komu vit til at spæla eitt sindur meiri verjukent enn ætlað, og tað kom okkum aftur um brekku, sigur hann. HB-liðskiparin heldur eisini, at tað ikki hóskar seg til HB at spæla verjufótbólt, tí tað hava teir ikki fólkið til, sigur hann.

Spurdur hvussu hann og liðfelagar hansara seta seg upp til dystin í kvøld, sigur Rúni Nolsøe, at tað er ikki so trupult, tí teir vilja fegnir vísa, at teir ikki eru so veikir, sum úrslitið í Georgia kundi bent á. Hann sigur, at teir í kvøld fara at royna at vaska talvuna reina, soleiðis at fólk kunnu síggja, at teir eru nóg góðir til at bjóða seg fram í Europa.

Í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá HB upplýsir heimasíðan hjá felagnum, www.hb.fo, at tað verður ókeypis atgongd til dystin. Dysturin á Tórsvølli í kvøld millum føroyameistararnar úr HB og georgisku meistararnar FC Wit verður klokkan 19.

# Tætt í íslendska toppinum

**ÍA fekk eitt stig í Grindavík, meðan heimaliðið fekk alt, tá ið oddaliðið vitjaði í Hafnafirði**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Ellinta umfarið í íslendsku landskappingini varð liðugt mánakvøldið. Tá vóru tvær uppgerðir á skránni. FH hevði vitjan av oddaliðnum Fylkir úr Reykjavík, og Julian Johnsson og liðfelagarnir í ÍA vóru í Grindavík og vitjaðu Albert Sævartsson og liðfelagarnar hjá honum.

ÍA fekk eitt stig til hús aftur við sær. Úrslitið var 1-1. Eftir at heimaliðið hevði verið á odda, javnaði ÍA miðskeiðis í 2. hálvleiki.

Fyri spenningin í Landsbankadeildini hevði tað stóran týdning, at FH megnaði at vinna 1-0 á heimavølli í Hafnafirði ímóti høvuðsstaðarfelagnum og oddaliðnum Fylkir. Tað úrslitið hevur við sær, at tað er so tætt í toppinum, sum tað næstan kann vera.

FH er nýtt oddalið. Teir hava tjúgu stig, men tað eru bara trý stig aftur til Julian Johnsson og liðfelagarnir, sum eru á fjórða plássinum við seytjan stigum. Fylkir hevur nítjan stig, og ÍBV hevur átjan stig.



*Julian Johnsson var millum teir bestu hjá ÍA, tá teir mánakvøldið fingu javnleik ímóti Grindavík, sum hevðI Albert Sævarson millum stengurnar*

Í botninum styrkti Grindavík við javnleikinum eitt sindur um sína støðu. Nú eru teir við ellivu stigum næstaftastir við sama stigatali, sum KA av Akureyri hevur. KA er triðiaftast. Fram, sum hevur tveir føroyskar spælarar á liðnum, er framvegis aftast. Tá ið Fram sunnudagin á heimavølli tapti 2-1 ímóti ÍBV, var Hans Fróði Hansen ikki við. Fróði Benjaminsen var á miðvøllinum inntil miðskeiðis í 2. hálvleiki, tá ið hann varð skiftur út.

At tað er so tætt millum feløgini ber við sær, at tað rættuliga skjótt kunnu gerast stórar broytingar á støðutalvuni. Tólvta umfarið verður spælt í næstu viku. Tríggir dystir eru á skránni sunnudagin. Tá verður Føroya uppgerð á Akranesi, sum fer at fáa vitjan av Fram. Sunnudagin spæla eisini Keflavík og FH og Víkingur og KR. Mánakvøldið skal Grindavík sppæla á útivølli í Reykjavík ímóti Fylkiri, og týskvøldið skulu ÍBV og KA spæla.

## Leita eftir álopsspælara

Venjarin hjá ÍA sigur við íslendska Morgunblaðið, at teir á Akranesi leita eftir nýggjum álopsspælara, sum kann hjálpa teimum tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum. Tað kemst av, at teir hava mist tveir álopsspælarar. Ein er fluttur til Val í Reykjavík, og kanadiumaðurin, sum hevur verið í felagnum eina tíð, er fluttur til Grikkalands. Harafturat verður Stefán Þórðarson leikbannaður í UEFA Cup dystinum á útivølli eftir reyða kortið, sum hann fekk í síðstu viku. Á Ólavsøku skal ÍA spæla í UEFA Cup í Estlandi.

Sambært ÍA venjaranum, Ólafi Þórðarsyni, so verður tað hvørki í Íslandi ella kanska í Føroyum, at teir eru í holtur við at leita eftir nýggjum spælara. Í fyrstu atløgu leita teir í Jugoslavia, og tað verður ivaleyst í hesi vikuni, at tað verður greitt, um Julian Johnssson fer at fáa ein nýggjan viðspælara, og hvør hann verður.



# Fastur startur í eina fjórðings øld



*Tá Ið róð verður kapp á ólavsøku um góða viku, er tað 25 árið á rað, at fasti starturin verður nýttur til róðurin*

**Í kvøld verður klárt hjá kappróðrarbátunum at venja startin, sum Havnar Róðrarfelag hevur sett á Argjahøvda**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Mánakvøldið fóru teir í Havnar Róðrarfelag undir fyrireikingarnar at leggja fasta startin út. At fasti Ólavsøku starturin verður lagdur á Argjahøvda er nakað, sum kappróðrarmanningarnar bíða eftir. Tá ið hann er lagdur, ber tað rættuliga til at venja startspurtin undir júst teimum umstøðunum, sum tað um eina viku fer at verða kappast undir. Hetta er nakað, sum manningarnar ganga høgt uppí.

Longu í vikuskiftinum vóru fremmandir kappróðrarbátar at síggja á Havnarvág, og ivaleyst vera teir fleiri nú undan vikuskiftinum, tá ið síðsta hondin verður løgd á fyrireikingarnar til ta síðstu av teimum sjey FM kappingunum. Tá ið ein rúgva av kappróðrarbátum eru at síggja framvið Molanum og undir Argjahøvda, kennist rættuligur ólavsøkudámur í høvuðsstaðnum.

Heðin Hansen, formaður í Havnar Róðrarfelag, sigur, at tað er sami starturin, sum teir nýta á hvørjum ári. Treyðugt so er neyðugt at hampa um okkurt og broyta okkurt annað, men talan er í tí stóra og heila um sama startin, sum hevur verið nýttur síðani í 1979. Tað vil við øðrum orðum siga, at hetta er 25. árið, at fastur startur verður brúktur á ólavsøku. Talan er um serstakan start, sum Havnar Róðrarfelag eigur. Talan er sostatt ikki sum tann fasta startin, sum Róðrarsamband Føroya eigur, og sum hevur verið nýttur tey seinastu árini.

## Mál og teinar

Tað hevur ikki verið tí, at teir ikki hava verið nøgdir við tað, sum var frammanundan. Kappróðrarmálini og róðrarteinarnir á ólavsøku hava ofta verið broyttir. Orsøkirnar hava verið menningin, sum hevur verið niðri við sjógvin í høvuðsstaðnum.

Tey fyrstu árini róðu teir frá Argja landinum og inn á Eystaru vág. Startmálið plagdi at vera úti á Gulanum.

Niels Juel Arge, sáli, sigur í 50 ára minningarritinum hjá Havnar Róðrarfelag, at í 1918 startaðu teir vestanfyri Skansaboðarnar. Hetta heldur hann vera, tí konufólk eisini róðu.

Í 1920unum kom Molin so mikið langt út, at teir hálsaðu um, og so varð rógvið inn á Vestaru vág. Málið plagdi at vera undir smiðjuni hjá Wenzeli Petersen.

Síðsti ólavsøkukappróðurin inn á Vestaru vág var í 1970. Tá høvdu teir sett so nógv upp í Molan eystanfyri og eisini upp í á Gulakletti, at tað var ov trongt til kappróður.

Í 1971, 1972 og í 1973 var ólavsøkukappróðurin uttanfyri eystara Molan. Tað varð kappast á øllum trimum teinunum, men hetta var ikki mett at vera nøkur serliga góð loysn. Í 1974 varð gjørt av, at róðrarteinurin skuldi vera frá Argjahøvda og innanfyri Molan. Síðani tá hava allar bátastøddirnar kappast á 1000-metrum ella knapt tað. Sum vit so ofta áður hava nevnt tað undan ólavsøkuni, so er róðrarteinurin frá Argjahøvda og inn undir Skipafelagið 901,35 metrar. Hetta hava vit áður fingið at vita frá Matrikulstovuni, sum hevur ábyrgdina av at máta kappróðrarøkini.

Ólavsøkuróðurin var fyrsta kappingin, har tað var neyðugt hjá øllum bátunum at kappast á styttsta teininum. Síðani er hetta eisini broytt í t.d. Vestmanna, Miðvági, og í Vági, og alla staðni hevur orsøkin verið tann, at havnaløgini hava verið longd og útbygt.

## Fasti starturin

Á Ólavsøku hava teir, sum sagt, havt fastan start síðani í 1979. At teir hava havt fastan start, og at róðrarteinurin hevur verið stuttur, hevur borið við sær, at samlaða róðrartíðin hevur verið stutt. Onkuntíð hevur mjørkin argað, men sum oftast hevur tað borið til at avgreitt allar róðrarnar eftir minni enn tveimum tímum og onkuntíð styttri enn tað.

Sambært kappróðrarbókini hjá Niels Juel Arge vóru tað Petur A. Nielsen og Eigil Hansen, sum í 1979 gjørdu fasta startin. Hann hevur síðani tá verið nýttur á hvørjari Ólavsøku. Í hesi vikuni hava ungir menn, sum kanska ikki vóru føddir ella kanska vóru smádreingir, tá ið fasti starturin fyrstu ferð varð lagdur úr fyri 25 árum síðani, verið í holtur við at fyrireika og leggja startin út. So er eftir at venja startin. Tað er tað, sum kappróðrarbátar úr høvuðsstaðnum og eisini aðra staðni frá fara at gera næstu dagarnar. Tað ber rættuliga boð um, at ólavsøkan ikki er langt burtur.

# Nógvur fótbóltur í Suðuroy

**Seinni í vikuni fara tey fýra feløgini í Suðuroy at dystast um steyp, sum Lions í Suðuroy hevur sett út at kappast um**

LIONS CUP
*Jóannes Hansen*

Tað hevur gingið sum eftir ánni við fótbóltinum í Suðuroy, og áhugin er so stórur, sum hann sjáldan hevur verið áður. VB er frammarlaga í bestu deildini, TB er fremst í næstbestu deildini, Royn er væl fyri, og Sumba hongur eisini í.

At nógvar innanhýsis uppgerðir hava verið og fara at vera í næstbestu deildini, ger ikki áhugan minni millum suðuroyingar. Ikki minst tá ið talan ofta er um toppdystir.

Hvussu væl feløgini eru fyri, nú tað um eina stóra viku aftur verður farið undir landskappingina, fer ein ábending at fáast um fríggjadagin og leygardagin. Tá skipar Lions í Suðuroy fyri fótbóltskapping millum tey fýra feløgini í Suðuroy. Spælt verður í Hvalba fríggjadagin og í Vági leygardagin. Vinnandi liðið fær stórt steyp, sum Lions hevur givið at kappast um. Peningurin, sum kemur inn í sambandi við kappingina, verður latin til vælgerandi endamál. Formaðurin í Lions í Suðuroy, Jens Petur Brattalíð, sigur, at annar parturin verður latin til Stóra pakkhús í Vági. Hin parturin verður latin til okkurt í norðaru helvt av oynni. Støða er ikki tikin til, hvat tað verður.

Fríggjadagin klokkan fimm spæla Sumba og Royn og klokkan sjey spæla VB og TB. Hesir báðir dystirnir verða í Hvalba. Leygardagin klokkan 13 verður spælt um triðja plássið, og klokkan 15 verður finalan. Leygardagin verður spælt í Vági.